Steffan Klein Poulsen
Beinir Johannesen
Bárður á Steig Nielsen
Jenis av Rana
Helgi Abrahamsen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingsfólk

Broytingaruppskot II

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 90/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 11 verður orðað soleiðis:
   "§ 9, stk. 6 verður strikað."

2. § 1, nr. 12 og 13 verða strikaðar.
   Nr. 14 – 22 verða eftir hetta nr. 12 – 20.

Viðmerkingar:
Hóast nógv talar fyri, at vit eiga bara at hava eitt elnet frá søluliðinum og út til kundarnar, so er eingin orsøk til at forða fyri, at elframleiðarar kunnu hava sítt egna net ímillum einstøku framleiðslueindirnar. Eisini talar nógv fyri, at til dømis vinnufyritøkur skulu kunna framleiða sín egna streym og leiða hann inn á virkið uttanum almenna elnetið.

Men av tí at hetta er eitt broytingaruppskot viðvíkjandi einum evni, sum annars er rættiliga torgreitt, verður í hesum førinum bara skotið upp at halda fast við orðingarnar í galdandi lóg um elnetvirksemi. Aðrar broytingar, sum krevja gjøllari fyrireiking, kunnu verða gjørdar í øðrum lógaruppskoti.

Viðmerkingar til broytingarnar:
Avleiðingin av broytingaruppskotinum er, at tað ikki verður nágreinað, at tað einans er SEV, sum hevur loyvi til netvirksemi. Vent verður aftur til ásetingarnar í galdandi lóg, sum áseta, at loyvi krevst frá landsstýrismanninum til netvirksemi, t.e. flutningur av ravmagni, frá framleiðslustaði til brúkara, sbr. § 9, stk. 1 í elveitingarlógini.

Á Løgtingi, 23. mai 2023

Steffan Klein Poulsen	Beinir Johannesen
Bárður á Steig Nielsen	Jenis av Rana
Helgi Abrahamsen	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur